## DAGSINS MEINING

# Fótbóltsrúsur

Neyvan finst nakað tiltak ella fyribrigdi, ið kann savna so stóran áhuga millum íbúgvar í øllum heimspørtum sum fótbólturin. Og her er heimsmeistarakappingin juvelurin í krúnuni, har fleiri hundrað milliónir íbúgvar í Europa, Suðuramerika, Afrika og Asia eru savnaðar frammanfyri sjónvarpsskíggjan fyri at fylgja sínum landsmonnum ella sínum favorittliðum.

HM-kappingin í Japan og Korea er einki undantak í so máta. Her hava fleiri av heimsins bestu fótbóltstjóðum kappast um at koma víðari til finaluna. Undan hesi kappingini hava kvalifikatiónsdystir skilt tey bestu liðini frá. Nógvar frægar fótbóltstjóðir sum Holland, Tjekkia, Skotland, Finland og Norra eru als ikki við í endaspælinum. Og her kunnu vit so eisini nevna Føroyar, sum enn ongantíð hava rokkið so langt sum at koma við í eitt endaspæl hvørki í EM ella HM. Hvat framtíðin fer at bjóða er so nakað vit hava til góða.

Kappingin er komin í helvt, og longu nú eru fleiri av heimsins frægastu fótbóltstjóðum soldaðar frá, eitt nú Frakland, Argentina og Rusland. Aðrar tjóðir, sum hava víst sera gott spæl, men sum ikki rukku longur, eru Svøríki, Danmark, Kroatia, Belgia, Írland og Portugal.

Eftir í kappingini eru tó framvegis týðandi fótbóltstjóðir, eitt nú Ongland, Brasilia, Italia, Týskaland og Spania. Helst verður tað eitt av hesum londunum, sum verður heimsmeistari. Men eisini onnur lond, sum ikki hava gjørt so nógv um seg í altjóða fótbólti fyrr, eru komin víðari, eitt nú Senegal og Turkaland. Hesi londini kunnu, sum tey longu hava víst, skaka tær stóru fótbóltstjóðirnar. Eingin fer at gloyma eyðmýkjandi ósigurin hjá fronsku HM-meistarunum, tá teir taptu 1-0 móti Senegal. Tað var eisini Senegal, sum knústi HM-vónina hjá tí sterka svenska landsliðnum.

Fyri mangar tjóðir um okkara leiðir er fótbólturin tjóðarítrótt. Fyri føroyingar er tað tí hugskoytt, at norrønu brøður okkara sviar og danir eru úti av kappingini. Men vit hava so eisini eina grannatjóð, har fótbólturin er eitt og alt, og tað er Ongland. Mangir føroyingar, sum vanliga fylgja Owen og Beckham í ensku kappingini, seta sítt álit til, at bretar loksins vinna HM-heitið. Men tað eru eisini mong fótbóltsáhugað, sum fegin síggja tað livandi, individuella og vakra brasilianska fótbóltsspælið í vinnarasessinum. Fyri hesi er dysturin fríggjadagin millum Ongland og Brasilia ein lagnudagur. Annað av londunum skal tungu leiðina heimaftur. Men vit fara helst at fáa ein perlu av einum fótbóltsdysti, tá Beckmann og Ronaldu fara á vøllin saman.

Tað er neyvan ov nógv sagt, at fótbóltur og her serstakliga tá hann kemur uppá eitt slíkt høgt støði sum til heimsmeistarakapping, er eitt tað tiltakið, sum kann savna flestu menniskju her heima um sjónvarpstólini. HM-fótbóltur er sum ein rúsur fyri mong, men fyri tey flestu, koma eisini timburmenninir, tá eins egna favorittlið tapir og er “out”. Hóast hetta fyri mong av okkum kenst sum eitt persónligt tap, so vil fótbóltur á so høgum støði, líka mikið hvat fótbóltstjóðin eitur og hvønn vit halda við, vera eitt njótilsi fyri eygað. Eitt ótrúligt og fasinerandi spæl, har eingin skal kenna seg tryggan, og har stórar fótbóltstjóðir kunnu verða koppaðar av smærri tjóðum. Sum tá Senegal tók fronsku tjóðina á bóli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Minnilutadiktatur?

**Kaj Leo Johannesen**
*Tórshavn tann 16.06.2002*



Ein politiskur flokkur, sum tiltuskar sær meira vald, enn veljarin hevur givið við sokallaðum alliansum fyri at gerast líka stórur sum vinnarin, hevur eftir mínum tykki sett skeiva kós, líkamikið um nógv halda tað er smart, ella væl telvað.

Í Sosialinum frá 8. juni í ár ger Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður, viðmerkingar til valið 2002, til okkara stýrisskipan frá 1948 og til nýggju stýrisskipanina frá 1994.

J. S. viðgerð hugtakið samgonga, og skrivar, at vit við skipanini frá 1948 politiskt hava livað við eini skipan, sum í veruleikanum bygdi á **meirilutadiktatur** heldur enn vanligt parlamentariskt demokrati.

Síðani verður nýggja stýrisskipanin umrødd, og har verður staðfest, at vit nú hava fingið eitt meirilutalandsstýri. Nú eitur tað ikki longur eitt **meirilutadiktatur.**

Ein sera løgin niðurstøða, tá hugsað verður um, hvussu hetta landsstýrið kom til valdið.

Løgmaður hevur við nýggju stýrisskipanini loyvi at gera júst tað, sum hann hevur gjørt, men mannagongdin hevur lítið við vanligt parlamentariskt demokrati at gera.

Størsti flokkur við 7.948 atkvøðum fekk ongantíð møguleikan at samráða seg fram til ein parlamentariskan meiriluta. Næststørsti flokkurin við 7.240 atkvøðum fekk heldur ikki møguleikan, og tristørsti flokkurin við 6.371 atkvøðum fekk heldur ongan møguleika.

Flokkurin sum gjørdist nr. 4 við 20,8 % av atkvøðunum, og sum misti undirtøku, var tann einasti sum fekk møguleikan at samráða seg fram til eina samgongu, sum líkaði honum best ella næstbest.

Løgmaður forðaði fleiri samgongumøguleikum: A.B.C. - A.B.C.H. - A.C.E. - A.C.E.H. - B.E.D. - B.E.D.H. og tað gjørdi hann, hóast allar góðu ein parlamentariskan meiriluta, og tískil eigur skipanin frá 1994 at vera endurskoða, soleiðis at ein formansrunda altíð kemur upp á tal aftan á eitt løgtingsval.

Tað kann vera, at vit kortini fingu somu samgongu aftan á eina formansrundu, men tá hevði talan verið um eina samgongu, sum varð skipa eftir mínum tykki, demokratiskari mannagongd.

J. S. endar sína viðmerking við at skriva um følsk lyftir - tað var betur ógjørt fyri ein fyrrverandi løgmann.

Skrivað verður eisini um, hvussu nógv samríkisflokkurin C hevur klistrað seg til hin samríkisflokkin B. Men hóast als einki klistur hevur verið millum C. og B., so gloymir J. S., at hansara flokkur hevur brúkt nógv meira enn klistur, hann hevur beinleiðis niðurbundið D. fyri harvið at forða teim mongu samgongumøguleikum, sum nevndar eru frammanfyri, og fyrst nú eftir at samgonguskjalið er undirskrivað, hevur Ùtvarpið boðað frá, at bindingin millum A og D er avtikin, soleiðis at D nú aftur en ein fríur flokkur.

Annars fer undirritaði at gera alt fyri at arbeiða konstruktivt tey næstu fýra árini og taka undir við uppskotum, sum eg meti eru til gagns fyri Føroya fólk, líkamikið um meiriluti ella minniluti eigur uppskotið, og sjálvandi eisini um flokkurin hjá J. S eigur uppskotið.

# Framtíðin í Føroyum!

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Tað er framtíðin at kunna liva og virka sjálvstøðugt og við fíggjar- og persónsfrælsi og við skipa heima arbeiði og heimahandil og skipa heimaparty úti og heima!

Tað er tá ein hevur fingið dagført heimasíðu og fingið sínar lýsingar á føroyskum, donskum, enskum við flaggi og fáa slíkt bæði á fo og com óheft av hvørjum øðrum!

Tað er tá ein fær skipað sítt fylgisveina og internet og telesamskifti samstundis og er tað spennandi at arbeiða fram ímóti slíkum ið ein fæst við!

Tað er tá ein skal spæla sær við globus/jørðina um ein kemur nóg skjótt ígongd við at fá skipa fyri øllum tí áðurnevnda og arbeiða við sínum verkætlanum!

Tað hava verið nógvar seinkingar vegna lívslanga arvastríði og ein hevur fleiri dagføringar at fáa uppá pláss og fáa skipa viðurskiftini/lívskorini!

Tað hevur verið ein fortreyt at fáa klára upp við fortíð, nútíð, dagligu fyribrigdir og skapa sær framtíðina og sosiala trygdarneti, ígjøgnum bløðini!

Tað er nógv broytt til tað betra seinastu árini, hvørs tað hevur gingið støðugt framá, og skipa lív og fjøltátta virksemi, ein kunnar øll ígjøgnum bløðini.

Tað er ein marknaður fyri keyp/sølu av øllum tí, ein fæst við at fyrireika seg til í næstum, tá ein er klárur at byrja av álvara heiman ífrá í Havnini!

Tað hevur kravt nógv av einum at náa so langt og uppá eitt hægri støði og vinna sær fólkatekki, tað at vera góðkendur og virðismettur í Havnini!

Tað er gott at staðfesta sín rættleika í øllum tí lívslanga arvastríði nú øll halda sín gák í dag!

**PS. Eg skal hava fylgisveina sjónvarp og móttakara.**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Búskapur og vinna:

## Heldur í Statoil enn bankan

Herfyri skrivaðu vit, at norðmenn hava ongantíð fingið so nógv útgoldið í frítíðarløn sum í ár, og at meginparturin av pengunum fer til frítíðarferðir.

Nú mælir leiðslan í Statoil fólki til at nýta ein part av pengunum til at keypa sær partabrøv í oljufelagnum. Í gjár var eitt ár liðið, síðani Statoil varð skrásett á partabrævamarknaðinum í Oslo. Tá nýttu nógv fólk høvi til at seta 25.000 krónur í partabrøv í felagnum og sambært leiðsluni hava hesi nú eitt ár seinni fingið 17 prosent í vinningi.

Leiðslan í Statoil vísir á, at til saman-beringar hava tey, sum settu 25.000 krónur í bankan um sama mundið, fingið millum seks og sjey prosent burturúr. Tí er eingin ivi um, hvat lønar seg betur, heldur Statoil-leiðslan.

## Nordea kanska enskur

Norðurlendski bankin Nordea verður kanska ikki norðurlendskur so leingi afturat. Tað er komið fram, at tann stóri enski bankin Lloyds hevur hug at keypa Nordea. Lloyds er fimtistørsti bankin í Bretlandi og hevur eitt marknaðarvirði, sum liggur um 500 mia. krónur. Marknaðarvirðið á Nordea er mett til einar 120 mia. krónur.

At enski stórbankin hevur áhuga í Nordea er uttan iva tann norðurlendski marknaðurin, men tað hevur ivaleyst eisini áhuga, at Nordea hevur fingið fótin fastan í Eysturevropa, eftir at Nordea fyri stuttum keypti ein banka í Pólandi. Nordea hevur eisini deildir í Russlandi, Estlandi, Letlandi og Litava.

## Stórt flog

Danska verksmiðjan LM-Glasfiber, sum ger veingir til vindmyllur, fer nú at gera heimsins størstu vindmylluveingir. Saman við einari týskari fyritøku skal danska verksmiðjan gera nakrar serliga stórar vindmyllur, har flogið verður heilar 125 metrar.

## UTTAN ÚR HEIMI

# 17 deyð av sjálvmorðsbumbu



*Spreingingin var so sterk, at bæði takið og síðurnar vórðu slongd oman av bussinum*

*Mynd: Reuters*

**17 fólk doyðu av einari sterkari sjálvmorðsbumbuspreinging í Gilo við Jerusalem í gjár**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður sprongdi tíðliga gjáramorgunin eina sterka bumbu í einum bussi í Gilo við Jerusalem. Maðurin kom inn í bussin, sum stóð á einum krossvegi og bíðaði eftir ferðsluljósinum.

Nógv fólk vóru í bussinum, teirra millum fleiri ungdómar, sum vóru á veg í skúla. Ísraelska løgreglan segði í gjár, at17 fólk vóru deyð, og at millum 40 og 50 høvdu fingið skaða.

Spreingingin var so sterk, at takið og síðurnar á bussinum vórðu sprongd burtur, og petti av bussinum flugu langan veg ígjøgnum luftina.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, sum sjálvur kom á staðið seinni, segði, at spreingingin var liður í palestinska yvirganginum ímóti ísraelska fólkinum, men hann lovaði, at Ísrael fer at gera tað, sum eigur at verða gjørt. Sharon legði afturat, at atsóknin var enn eitt prógv fyri, at palestinski leiðarin, Yasser Arafat, ger ov lítið fyri at forða tílíkum atsóknum.

Palkestinska leiðslan vísti alt fyri eitt skuldsetingunum aftur. Talsmaðurin hjá sjálvsstýrismyndugleikunum, Saeb Erekat, segði, at myndugleikarnir átaka sær onga ábyrgd av atsókníni.

Ísraelsku myndugleik-arnir vóru annars ávaraðir um, at palestinar ætlaðu at spreingja í hvussu er eina sjálvmorðsbumbu í Ísrael. Løgreglan var eisini á varðhaldi, vmen hon megnaði kortini ikki at forða hesum palestinska bumbumanninum at fullføra ætlan sína.

# Islamskar lógir skulu galda í Afghanistan

**Tá Taleban sat við valdið í Afghanistan, funnust nógv at stýrinum, tí tað nýttu ta strongu islamsku Sharia-revsilógina. Men sama lóg verður eisini galdandi undir nýggja stýrinum**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Nývaldi forsetin í Afghanistan, Hamid Karzai, hevur slakað fyri trýstinum frá teimum víðgongdu islamsku kreftunum í eldraráðnum og hevur gjørt av, at landið framvegis fer at nýta ta strongu islamsku Sharia-revsilógina, sum tað frákoyrda Taleban-stýrið nýtti.

Í einari røðu mánadagin segði Karzai, at landsins lógarverk skal byggja á islamsk grundsjónarmið. Samstundis boðaði hann frá, at í framtíðini verðir islam grundarsteinurin undir bæði teimum politisku og teimum rættarligu skipanunum í landinum.

Ein talsmaður hjá forsetanum royndi seinni at sissa tey, sum funnust at orðunum hjá Karzai. Talsmaðurin segði, at hóast Sharia-revsilógin verður sett í gildi, verða ávísar broytingar gjørdar. Talsmaðurin nevndi, at ætlanin er ikki, at ein kvinna skal steinast til deyða, hevur hon verið manninum ótrúgv, og ætlanin er heldur ikki, at tjóvar skulu missa aðra hondina, sum Sharia-revsilógin annars fyriskrivar. Sambært talsmanni forsetans fáa fólk eisini møguleikan at skjóta dómar inn fyri hægri rætt.

Úr Afghanistan verður sagt, at sterkar islamskar kreftir hava lagt stórt trýst á Hamid Karzai seinastu dagarnar fyri at fáa hann at lýsa Afghanistan sum eitt islamskt lýðveldi.

Úr Norðurlondum:

## Byggja nýtt operahús

Norska stórtingið samtykti mánadagin at byggja eitt nýtt operahús í Oslo. Samstundis ásettu politikararnir, at operahúsið skal kosta í mesta lagi 3,3 milliardir krónur.

Í operahúsinum verður ein høvuðspallur, har pláss verður fyri 1700 áskoðarum, og til ein minni pall verða 400 áskoðarapláss. Nýggja operahúsið verður heilar 36.000 fermetrar.

Tað var stjórnin, sum hevði skotið upp at byggja nýtt operahús í Oslo, og sambært ætlanini skal húsið takast í nýtslu í 2008.

## Farum skal kannast

Ein meiriluti í danska Fólkatinginum hevur gjørt av at kanna gøluna í kommununi Farum. Teir báðir stjórnarflokkarnir eru ikki við í meirilutanum, men stuðulsflokkurin hjá stjórnini, Danski Fólkaflokkurin, tekur kortini undir við at kanna, hvat veruliga hendi í Farum.

Sambært meirilutanum var tað, sum hendi í Farum, so álvarssamt, at tað hóttir tað kommunala sjálvsstýrið í Danmark. Tí er umráðandi at kanna gongdina, og hvussu gølan kundi gerast so stór, sum hon gjørdist.

Frammanundan hava myndugleikarnir gjørt av at seta tvær kanningar í verk av Farumgøluni.

## Hvør lat skotini av?

Kriminalløgreglan og ákæruvaldið í Noregi hava gjørt av at halda fram við at kanna Orderud-morðini, hóast tey fýra, sum vórðu ákærd í málinum, eru dømd. Trupulleikin hjá kriminalløgregluni og ákæruvaldinum er, at tað er framvegis ikki komið fram, hvør av teimum fýra dømdu lat tey drepandi skotini av. Ákæruvaldið sigur seg hava ávís spor at ganga eftir, men at kanningarnar fara at taka drúgva tíð. Men tað er umráðandi at finna drápsmannin ella-kvinnuna, sigur ákæruvaldið.